einfaldari
- ger tað einfaldari
Juni 2011

Pastor JZ nú eisini Dr. JZ

Jógvan og Unn Zachariassen

Leygardagin 7. mai fekk JZ handað doktaraprógvið og kápuna. Jógvan hevur arbeitt við hesum síðani 2007 og hevur ferðast aftur og fram millum Føroyar og Dallas í Texas, einar tvær ferðir um árið.

Seinasta árið hevur hann serliga arbeitt við ritgerðini, sum handlar um gudfrøðina í tónleiki. Í uppgávuni kallar Jógvan á tónleikarar - og listafólk yvirhøvur – til at koma at kenna kreativitet Guds á ein hátt, sum fær teir út um samkomuveggirnar og inn í samfelagið at náa menniskju fyri Kristus við tónleiki og list. Jógvan er útbúgvin tónleikari og gudfrøðingur, og nú hevur hann smeltað hesar útbúgvingarnar saman í eina heild.

Jógvan sigur: ”Hetta hevur verið ein spennandi og gevandi ferð, sum hevur broytt mítt lív - ikki bert mítt høvd, men serliga mítt hjarta.” Spurdur, um hann ætlar, at fólk skulu kalla hann Dr. Zachariassen, svarar hann við einum smíli, at í Lívdini er hann tann sami Jógvan, men kanska í ymiskum øðrum umstøðum kann Dr. Zachariassen koma væl við. Vit ynskja Jógvani hjartaliga til lukku við avrikinum.

Stríðið hitt góða stríð

Paulus sigur í 2. Tim. 4:7-8, "Eg havi strítt hitt góða stríð, havi runnið skeiðið at enda ... nú liggur rættvísikransurin mær til reiðar ..." Hóast Paulus her talar um alt sítt lív, sum nú er komið at enda, so vilja vit fegin nýta hesa mynd at ynskja øllum teimum til lukku, sum eru liðug við skúlar og útbúgvingar í summar. Tit hava strítt eitt gott stríð, og tit hildu á til endan. Ja, nú skulu tit gleðast og fegnast um tykkara avrik! Bøn okkara er, at hesi somu orð Paulusar eisini skulu eyðkenna okkara lív og at vit stríða hitt veruliga góða stríð líka til endan - til dagin tá vit skulu standa andlit til andlit við Harran Jesus og kenna hansara hond leggja rættvísikransin á okkara høvd.

Jógvan Zachariassen

Hendingar & tiltøk

Til lukku við barninum

23. mai fingu Ásvør og Bjarni Jøkladal, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3430 gr.

Nógv at takka fyri

At kunna fara upp til ein nýggjan dag, at sleppa at liva lívið saman við teimum, sum hava nógv at týða fyri meg, at kunna draga andan, eta meg metta, njóta eitt vakurt útsýni o.s.fr. Jú, hetta er alt samalt Guds góðu gávur, sum eg má takka honum fyri.

Kelda: Sunnudagsskúlablaðið 8. mai 2011

Leiðarar til TeenStreet

Vit gleðast um, at 20 tannáringar úr Lívdini koma á legu hjá TeenStreet í summar, umframt fleiri onnur, ið koma sum hjálparfólk. Tað er stórur tørvur á leiðarum til TeenStreet. Tað er ein fortreyt fyri, at TeenStreet kann verða, at nóg nógvir leiðarar eru. Tað er gott hjá teimum ungu, at fólk úr samkomuni eru leiðarar, tí so kunnu teir stuðla teimum ungu í lívinum aftan á TeenStreet. Vónandi vilja fleiri vera við í hesi spennandi tænastuni, har ein fær møguleikan at hjálpa ungum í teirra lívi og sjálvur læra nógv. Tilmeldingarfreistin er skjótast til ber. Sí meira á www.teenstreet.fo.

Um tú hevur spurningar, kanst tú seta teg í samband við Duritu & Paula Djurholm, tlf. 230833/545149.

Nýggj familju-DVD

Beinta og Absalon Áargarð hava givið út eina familju-DVD við heitinum "Ljósið". Umframt Beintu og Absalon luttaka fleiri av teirra vinum, sum ikki eru dukkur og heldur ikki bamsur, men dumsur. Í sýningini heldur Niklái, at hann hevur mist sjónina, Peran sigur frá sínum lívi, Duke Quartet (Dukkukvartettin) syngur ein vælkendan sang, og eisini verður sagt frá søguni um mánan, sum ikki dugdi at lýsa.

Leygardagin 23. apríl var eitt stórt útgávutiltak á Torginum í SMS í hesum sambandi. DVD´in fæst í flestu bóka- og tónleikahandlum kring landið.

PAROLA - ein ferð í Orðinum

Frá 12. - 21. juli 2011 verður eitt føroyskt bíbliuskeið hildið í Italia.

PAROLA, ið merkir orð, hevur til endamáls at geva trúgvandi føroyingum møgu-leika at koma burtur frá strongda gerandisdegnum og brúka tíð í Orðinum og at geva teimum møguleika at fáa nakað av innliti í trúboðaralívið.

Skeiðið verður hildið í Molise landspartinum í Suðuritalia, har Heidi og Regin Guttesen búgva og virka. Undirvísarar verða Jógvan Júst Rasmussen, Einar Vang og Regin Guttesen.

Um hetta hevur tín áhuga, kanst tú seta teg í samband við Einar Vang (e_vang@olivant.fo / Tel 228038) ella Regin Guttesen (reginguttesen@gmail.com / Tel +39 32 8141 2581) og fáa meir at vita um PAROLA og um, hvussu tú kanst tekna teg.

Minibíbliuskúli og bønarmøti



Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður mini bíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

Praktisk umsorgan í Lívdini

Hjálparhondin er ein praktisk umsorganartænasta í Lívdini, sum veitir umsorgan, tá t.d. onkur hevur átt, tá onkur er álvarsliga sjúkur ella er sjúkur í longri tíð, tá fólk verða rakt av sorg og øðrum umstøðum, sum gera, at tey hava brúk fyri umsorgan.

Hjálparhondin heitir á fólk í samkomuni um at hava eygu og oyru opin, soleiðis at vit sjálvi fylgja við í, hvør hevur umsorgan fyri neyðini. Ynski okkara er, at fólk í samkomuni geva okkum boð um, hvørji fólk hava brúk fyri umsorgan, soleiðis at eingin dettur burtur ímillum. Upplýsingar um tørvir hjá fólki verða altíð viðgjørdir í trúnaði, sigur Beinta Áargarð, sum stendur fyri Hjálparhondini. Hon hevur tel. 312655 / 512655. mail adr: aargard@kallnet.fo

Skráin fyri týskvøldini juni 2011

Týskvøldið 7. juni
Mítt samfelag við Gud
– Hvat er at synda móti Heilaga Andanum?

Týskvøldið 14. juni
Kyknubólkar (Lonin opin til bøn)

Týskvøldið 21. juni
Mítt samfelag við Gud
– Hvussu kenni eg vilja Guds?

Týskvøldið 28. juni
Mítt samfelag við Gud
– Hvussu hoyri eg rødd Guds?

* Undirvísari: Jógvan Zachariassen

Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

Sunnudagin 5. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Manuel og tað lovaða landið (3. partur)
Framhaldsøga v/Beintu Áargarð

Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Bøn og bønarsvar (Rómbrævið 15:22-33)
Talari: Jógvan Zachariassen

Beinta

Jógvan

Sunnudagin 12. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Manuel og tað lovaða landið (4. og seinasti partur)
Framhaldsøga v/Beintu Áargarð

Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Týdningurin av nøvnum (Rómbrævið 16:1-16)
Talari: Jógvan Zachariassen

Ólavur

Sunnudagin 19. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Kreativt innslag: Tónamyndir v/Ólavi Jøkladal

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Evni: Ein seinasta áminning (Rómbrævið 16:17-19)
Talari: Jógvan Zachariassen

Duritu

Sunnudagin 26. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Kreativt innslag v/Duritu Djurholm

Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Bíða eftir Harranum
Talari: Johan Syderbø

Johan

Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson